Bárður á Steig Nielsen
Helgi Abrahamsen
Magnus Rasmussen
Johan Dahl
Eyðdis Hartmann Niclasen

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur
(Stuðul til avlamisakfør)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, § 11 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022, § 6 í løgtingslóg nr. 32 frá 9. mars 2023, løgtingslóg nr. 154 frá 19. desember 2023 og løgtingslóg nr. 45 frá 27. mars 2025 verður § 26 orðað soleiðis:

"**§ 26**. Stuðul verður veittur til keyp av bili til persón við varandi avmarkaðum likamligum ella sálarligum førleika, ið munandi skerjir møguleikarnar at ferðast, ella ger tað trupult at fáa ella varðveita eitt arbeiði ella eina útbúgving uttan brúk av bili. Stuðulin verður veittur sum eitt rentufrítt lán, sum í mesta lagi er 180.000 kr.
Stk. 2. Gera serlig viðurskifti seg galdandi í sambandi við avmarkaða førleikan, kann eitt rentufrítt og avdráttarfrítt lán veitast til at gjalda munin millum stuðulin sambært stk. 1 og prísin fyri at útvega ein dýrari bil.
Stk. 3. Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til vektgjald á bili, skrásettur áðrenn 1. januar 2017, við eginvekt oman fyri 1300 kg. Hetta er eisini galdandi, verður bilur sambært 1. pkt. endurskrásettur eftir 1. januar 2017.
Stk. 4. Stuðul verður veittur til meirútreiðslur til umhvørvisgjald á bili við CO2 útláti oman fyri 120 gramm pr. kilometur. Stuðul verður bert veittur til bil við eginvekt oman fyri 1300 kg.
Stk. 5. Persónur, sum lýkur treytirnar sambært stk. 1, kann fáa stuðul til meirkostnað í sambandi við at taka koyrikort og endurnýggjan av koyrikorti.
Stk. 6. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um:

1) treytir og umstøður fyri at fáa stuðul eftir stk. 1 og 2,
2) afturrindan av láni, undir hesum freistir fyri afturrindan og treytir fyri at eftirgeva lán umframt inntøkugrundarlagið fyri at afturgjalda,
3) møguleikan at fáa stuðul til at útskifta ein bil, ið stuðul er veittur til, sambært stk. 1 og 2,
4) stuðul til neyðuga innrættan o.a.,
5) í hvønn mun, stuðul kann veitast til at gjalda koyrifrálæru o.a.,
6) stuðul til persón, ið kemur inn í landið og hevur ein bil við,

7) treytir fyri at játta stuðul til vektgjald ella umhvørvisgjald eftir stk. 3 og 4, og
8) árliga prístalsjavning av upphæddini í stk. 1.”

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. Umsóknir um stuðul, sum ikki eru avgreiddar, tá hendan løgtingslóg kemur í gildi, verða viðgjørdar og avgreiddar sambært higartil galdandi reglum.

Almennar viðmerkingar
Endamálið við lógaruppskotinum er at venda aftur til gomlu skipanina fyri stuðul til avlamisakfør, ið tryggjar tey, ið hava tørv, bæði fíggjarligan stuðul og rættin til at fáa bil ella annað viðkomandi akfar.

1. januar 2024 kom í gildi ein broyting í lóg um almannatrygd og tænastur, ið hevur havt neiligar sosialar avleiðingar (LM-022/2023). Í viðmerkingunum til uppskotið um at broyta § 26 stóð, at: "*Endamálið við uppskotinum er at tálma útreiðsluvøkstri landskassans. Heldur enn at veita stuðul til bil, kann frameftir verða veittur stuðul til serligan útbúnað, sum er neyðugur fyri, at fólk við virkistarni kunnu koyra ein bil*."

Hetta hevur havt við sær neiligar sosialar avleiðingar, tí fólk við rørslu- og virkistarni, ið hava tørv á vanligum bili til at virka gerandisligt og fara til arbeiðis, men ikki hava tørv á serligum útbúnað til bilin, verða útilokað frá stuðulsmøguleikum til bil. Sostatt ger galdandi lóggáva mun á fólki við rørslu- og virkistarni við at raðfesta tey, ið tørva serligan útbúnað til bilin, framum tey, ið ikki tørva serligan útbúnað, men framvegis tørva bil.

Omanfyri nevnda grundgeving fyri at broyta § 26, sum var at tálma útreiðslurvøkstur landskassan, kann ikki metast at taka nóg nógv atlit til teir persónar, ið vórðu raktir av uppskotinum, umframt at raka tilvildarligt í tann mun, at ávísir persónsbólkar verða útvaldir og ávirkaðir av sparingarátøkum hjá landinum.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Ringt er at meta um nágreiniligu fíggjarligu avleiðingarnar av uppskotinum, tí hetta er tongt at nøgdini av umsøkjarum, harav ikki allir lúka treytirnar fyri stuðul. Við støði í upphæddini, ið varð spard burtur í sambandi við broytingina í LM-022/2023 verður mett, at fíggjarliga avleiðingin av uppskotinum verður umleið 1 mió. kr. árliga.
Galdandi lóg hevur neiligar fíggjarligar avleiðingar við sær, tí tað kostar samfelagnum, at borgarar verða noyddir at vera heima við hús grundað á vantandi førleika at ferðast uttan vanligan bil.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Broytingin hevur við sær at rættarstøðan verður hin sama, sum áðrenn broytingin í § 26 kom í gildi 1. januar 2024. Teir persónar, ið lúka treytirnar í § 26 hava rætt til stuðul sambært ásetingini og ikki bert til kassabil ella serligan útbúnað til bil.

Til § 2
Gildiskoma

Á Løgtingi, 31. oktober 2025

Bárður á Steig Nielsen	Helgi Abrahamsen	Magnus Rasmussen
Johan Dahl	Eyðdis Hartmann Niclasen	